## Úr Parlamentinum

Iris Robinson, kona fráfarna norðurírska fyrstaráðharran, Peter Robinson, hevur nú formliga sagt frá sær sætið í bretska Parlamentinum, sum hon hevur havt tey seinastu átta árini. Seinasta vikuskiftið bleiv hon koyrd úr flokki sínum í Norðurírlandi, samstundis sum hon bleiv biðin um at siga sessirnar í Parlamentinum og norðurírska tinginum frá sær. Iris Robinson hevur viðgingið, at hon hevði kynsligt samband við ein 19 ára gamlan mann, og at hon útvegaði honum pengar, so hann kundi keypa eina matstovu. Gølan hevði við sær, at maður hennara, Peter Robinson, er farin úr embætinum sum fyrstiráðharri fyribils.



## Sakna tveir danir

Danska uttanríkisráðið hevur havt samband við níggju av teimum ellivu donsku ríkisborgarunum, sum vóru í Haiti, tá jarðskjálvtin var. Teir hava tað eftir umstøðunum gott, men siga, at alt er í einum ruðuleika. Ein talsmaður fyri uttanríkisráðið sigur, at tey royna framvegis at fáa fatur á teimum báðum seinastu ríkisborgarunum, men at allar royndir hava verið til fánýtis higartil. Teir níggju danirnir, sum eru funnir, kundu sleppa úr Haiti við flogfari í gjár, men tað eydnaðist teimum ikki at fáa útferðarloyvi, áðrenn flogfarið fór. Norska uttanríkisráðið sigur, at ein norskur ríkisborgari er saknaður í haiti.

# Sleppa aftur at verma seg við koli úr Hvalba



*Í gjár kom fyrra helvtin av portalinum til nýggju kolaminuna í Hvalba á staðið við lastbili og um einar tveir mánaðir fer aftur at bera til at keypa kol úr Hvalba. Men tey ætla eisini at gera nógv burtur úr at brúka kolaminuna í ferðavinnuhøpi*

**Eftir at driftin hevur ligið still í eitt heilt ár, verður nú aftur farið undir kolagrevstur í Hvalba og eftirspurningurin er stórur**

KOLAGREVSTUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Um nakrar vikur fara teir aftur at høgga kol í Hvalba.

Tað eru tíðindi, sum mong hava bíðað eftir, tí eftirspurningurin eftir koli er stórur.

Men nú er tað eisini eitt ár síðani, at tann seinasti kolamolin varð høgdur í Hvalba og síðani hevur onki kol verið at fáa.

Og nú teir aftur fara at høgga kol, verður tað í eini nýggjari minu undir Prestfjalli, sigur Poul Laust Christiansen, stjóri í Roynds Kolasølu.

Tað hevur leingi verið greitt, at dagarnir fyri kolagrevstri í gomlu minunum undir Hvalbiarfjalli, vóru taldir, tí har var so lítið kol at fáa, at tað var meiri møði enn føði.

Tí fóru tey fyri einum fimm, seks árum síðani at kanna møguleikarnar fyri at gera eina nýggja minu og eftir jarðfrøðiligar kanningar hevur tað víst seg, at tað er heilt fitt av koli í Prestfjalli.

### Gingið strilti

Síðani hava teir arbeitt við at fáa einu minu har, men tað hevur gingið strilti.

Eitt er, at eitt sindur av vegi skuldi gerast.

Verri hevur verið, at tað hevur gingið illa at fáa inntakið til nýggju minuna, tí tað hevur riðið í aftur so hvørt, teir hava grivið.

Men nú hava teir so fingið ein portal úr stáli lagaliga til keyps frá Landsverki fyri 40.000 krónur og í gjár kom fyrri parturin av honu suður til Hvalbiar.

Portalurin er í fýra pørtum upp á tríggjar metrar hvør og hin helvtin kemur suður fyrsta dagin.

Um eina viku verður so farið at grava fyri inntakinum. Tað er nakað nógv at grava, tí tað eru eini 4000 kubikk, sum skulu gravast burtur. Men um nakrar vikur verður klárt at seta portalin so settur upp.

Poul Laust Christiansen væntar, at sostatt skuldi sjálvur kolagrevsturin kunna byrja um einar tveir mánaðir.

Hann leggur afturat, at í nýggju minuni er kolalindin einar fýra ella fimm ferðir tjúkkari enn í teirri gomlu minuni, so tað verður ein heilt onnur og meiri lønandi drift.

### Langur bíðilisti

Hinvegin verður eisini umhugsað at fara yvir aftur í gomlu minuna at taka eitt sindur fyri at lætta tað ringasta trýstið á eftirspurninginum, til grevsturin úr nýggju minuni er byrjaður.

Og eftirspurningurin er stórur.

Stjórin í Roynds Kolasølu sigur, at bíðilistin er langur og dag og dagliga verður ringt úr øllum landinum eftir koli.

Enn eru tað nøkur hús í landinum, sum bara hava kol at líta á

Hann sigur, at nú kol verður aftur at fáa, verður fyrst og fremst hugsað um tey, tí tað eru nevniliga framvegis nøkur húski í landinum.

Annars verður roynt at javna sum frægast, so at so nógv sum gjørligt, fáa eitt sindur og so verða bíleggingarnar avgreiddar heilt, tá ið rættilig ferð er komin á nýggju minuna.

### Ferðafólkavinarlig

Kolaminurnar í Hvalba hava í nógv ár verið væl umtókt ferðamál og ætlanin er at gera hesa nýggju minuna meiri ferðafólkavinarliga.

Eitt nú er ætlanin at fáa streym og elektriskt ljós í minuna.

Men tað, teir eru mest spent upp á, er, at ætlanin er at grava minuna tvørtur ígjøgnum fjallið og útaftur í berginum vestanfyri, tað er í Skorðunum, teir kalla.

- Tað verður uttan iva nakað, vit kunnu brúka í ferðavinnuhøpi, sigur Poul Laust Christiansen.

Akkurát, hvussu tey skulu skipa hetta ferðamálið, hava tey ikki gjørt sær greitt. Men fáa tey eitt hol mitt í berginum, ivast tey ikki í, at okkurt skilagott kann spyrjast burtur úr tí í ferðavinnuhøpi, tí útsýnið haðani er rættiliga stórfingið.

# Ognirnar hjá sjúkrakasanum enn í leysari luft

**Tað er ongin framdrift í samráðingunum um ognirnar hjá sjúkrakassunum, men tær eru ikki slitnaðar**

SJÚKRAKASSIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er framvegis ongin framdrift í samráðingunum ímillum Aksel V. Johannesen, landsstýrismann í heilsumálum og Meginfelag Sjúkrakassa Føroya um, hvat skal verða av ognunum hjá sjúkrakassunum í kjalarvørrinum á, at vit nú hava fingið eina almenna heilsutrygd.

Talan er um einar 40 milliónir, sum sjúkrakassarnir eiga.

Sjúkrakassarnir vilja varðveita ognirnar, ella í minsta lagi ein stóran part av teimum, til eina sjálvbodna heilsutrygging, sum skal vera eitt ískoyti til almennu heilsutrygdina.

Hinvegin vil landsstýrismaðurin, at peningurin skal fylgja við yvir í heilsutrygdina og brúkast til gransking og onnur almannagagnlig endamál.

Partarnir hava staðið langt frá hvørjum øðrum og tað gera teir framvegis.

Ætlanin var, at sjúkrakassarnir skuldu umsita heilsutrygdina í eini skiftistíð. Men har settu teir stutt fyri jól sum treyt, at ein loysn verður funnin á ognunum fyrst. Og tann loysnin skuldi vera, at sjúkrakassarnir varðveittu helmingin av ognunum.

Tað vildi landsstýrismaðurin ikki góðtaka og gjørdi ístaðin avtalu við starvsfólkið á sjúkrakassanum í Klaksvík um at umsita heilsutrygdina fyri fyrst.

Og har standa partarnir so og hvørgin vil víkja.

Hans Pauli Højgaard, nætformaður í Meginfelag Sjúkrakassa Føroya, sigur, at lítil og ongin framdrift er í samráðingunum, men hann vil ikki siga, at tær eru slitnaðar.

Meginfelag Sjúkrakassa Føroya hevði fund í fyrradagin at umrøða støðuna.

Eftir tann fundin skrivaðu við heilsumálaráðnum bræv, har vit staðfestu, at vit eru sinnað at halda fram við samráðingunum, so nú bíða vit eftir svarið úr heilsumálaráðnum, sigur Hans Pauli Højgaard.

Men sjúkrakassarnir eru framvegis avgjørdir um, at teir vilja ikki lata ognirnar av hondum uttan víðari.